# Jólakonsert í Gøtu kirkju



Sunnudagin 9. des. kl. 16 verður árliga jólakonsertin hjá Felagskórinum Gøta/Leirvík. Felagkórið hevur í heyst vant undir leiðslu av Petur Martin Johannesen ættaður úr Klaksvík. Við í kórinum eru umleið 30 sangara. Á skránni til jólakonsertina verða bæði føroyskir og útlendskir jólasangir. Nakir av sangunum verða framførdir við klaverfylgispæli og strúkararum. Sverri Jacobsen hevur klaverfylgispælið, Ljudmila Berezina og Alex Sólstein spæla violin, og Bogi Lútzen á bratch. Árliga jólakonsertin hjá Felagskórinum er fyri mong vorðin ein fastur og týðandi partur av tí at gera seg til reiðar til jólini og koma í jólahýr, og Felagskórið lovar at gera sítt besta til at løtan verður hugnaliga og góð og ynskir øllum vælkomnum á konsert.




















